Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	07.03.2024
Mál nr.:	22/16183
Málsviðgjørt:	HI
Ummælistíð:	06.12.23 – 05.01.24
Eftirkannað:	09.02.2024/ 20.02.2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
pantskipan fyri íløt

Allýsingar

§ 1. Í hesi løgtingslógini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:
1) Framleiðari: Ein, sum í Føroyum letur vøru fevnda av pantskipanini sambært løgtingslógini í ílat fevnt av pantskipanini sambært løgtingslógini til sølu ella avhendingar.
2) Góðkend móttøka: Móttøka fyri íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, sum er góðkend við heimild í § 8, stk. 1, og sum ikki er sølustað ella staðsett á einum sølustað.
3) Innflytari: Ein, sum flytur inn vøru fevnda av pantskipanini sambært løgtingslógini í ílati fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini.
4) Pantumsitari: Tann, sum landsstýrisfólkið við heimild í § 3, stk. 1, hevur litið til at umsita og reka pantskipanina.
5) Rakstrargjald: Gjald, sum verður lagt á øll innflutt og framleidd íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, til at rinda fyri allar útreiðslur, sum pantumsitarin hevur av pantskipanini, t.d. til íløgur, viðlíkahald, umsiting, rakstur, leigu av leysafæ og fastogn, flutning, kunningarátøk og grannskoðan.
6) Sølustað: Stað, har íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini við vøru fevndari av pantskipanini sambært løgtingslógini verða seld brúkarum.

Íløt, pant og rakstrargjald

§ 2. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um pantskipan fyri íløt úr metali, plasti og glasi.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur, hvørji íløt til hvat innihald pantskipanin skal fevna um.
Stk. 3. Pantið á íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini er:

1) kr. 2,00 á íløtum, sum rúma 0,5 litrum ella minni, og
2) kr. 4,00 á íløtum, sum rúma meira enn 0,5 litrum.
Stk. 4. Innflytarar og framleiðarar skulu gjalda pant fyri íløt, sum eru fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini.
Stk. 5. Innflytarar og framleiðarar skulu gjalda rakstrargjald fyri íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, hvussu rakstrargjaldið verður ásett.

Pantumsitari

§ 3. Landsstýrisfólkið kann gera avtalu við ein pantumsitara um, at hesin skal umsita og reka pantskipanina. Pantumsitarin kann vera ein almennur myndugleiki, ein kommunalur felagsskapur ella eitt privat felag ella felagsskapur, sum ikki miðar eftir vinningi.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, at rakstrargjald og onnur inntøka kunnu nýtast til stuðul til frama fyri pantskipanina.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um skylduna hjá pantumsitaranum at handfara íløt.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, hvussu pantumsitarin rindar pant, og at pantumsitarin kann seta treytir fyri at rinda pant.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið ásetur, at pantumsitarin skal gera ársroknskap fyri pantskipanina.
Stk. 6. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um nevnd, mannað við umboðum fyri framleiðarar, innflytarar og sølustøð, sum skal ráðgeva pantumsitaranum í sambandi við rakstur og íløgur.

Gjald og afturbering av panti og rakstrargjaldi

§ 4. Innflytarar og framleiðarar skulu gjalda TAKS pantið sambært § 2, stk. 3, og rakstrargjaldið sambært § 2, stk. 5, sambært reglunum í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.
Stk. 2. TAKS rindar pantumsitaranum peningin, sum kravdur er inn sambært stk. 1.
Stk. 3. Fær pantumsitarin fleiri íløt inn, enn pant og rakstrargjald eru rindað fyri sambært stk. 2, kann pantumsitarin krevja írestandi peningin frá innflytaranum ella framleiðaranum, sum íløtini eru skrásett hjá, sbr. § 7, stk. 2.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um at bera innflytaranum og framleiðaranum pant og rakstrargjald aftur í sambandi við proviantering, tollfría sølu og útflutning.

Móttøkuskylda, upplatingartíðir og skylda at rinda pant

§ 5. Sølustøð og góðkendar móttøkur hava skyldu at taka ímóti øllum íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini. Landsstýrisfólkið ásetur undantøk frá móttøkuskylduni sambært 1. pkt.
Stk. 2. Sølustøð og móttøkur hava skyldu at rinda viðskiftafólki pantið sambært § 2, stk. 3, fyri íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, sum eru skrásett sambært § 7, stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur undantøk frá skylduni sambært 1. pkt. fyri íløt, sum fløskuautomatir ikki fáa handfarið og lisið, ella sum appir ella skannarar ikki fáa lisið.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri, hvussu nógvar tímar um vikuna móttøkur og sølustøð skulu taka ímóti íløtum, hvussu kunnast skal um pantið á íløtunum, hvussu pantið skal gjaldast út o.tíl.

Handfaring av íløtum

§ 6. Sølustøð, móttøkur, framleiðarar, innflytarar og onnur, sum taka ímóti ella savna íløt, hava skyldu at handfara íløt at lata pantumsitaranum í samsvari við tær reglur, sum pantumsitarin ásetur í reglugerð, og sum landsstýrisfólkið hevur góðkent.
Stk. 2. Pantumsitarin kann krevja gjald fyri tilfar til at handfara íløt. Gjaldið skal

samsvara við kostnaðin av tilfarinum og góðkennast av landsstýrisfólkinum.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, at gjaldið sambært stk. 2 verður afturrindað, tá ið tilfarið til at handfara íløtini er fingið pantumsitaranum aftur.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur reglur fyri útflutning og innflutning av brúktum íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini.

Skráseting hjá pantumsitaranum

§ 7. Sølustøð við móttøkuskyldu sambært § 5, góðkendar móttøkur, innflytarar og framleiðarar hava skyldu at skráseta seg hjá pantumsitaranum. Landstýrisfólkið ásetur reglur fyri skrásetingina.
Stk. 2. Framleiðarar og innflytarar hava skyldu at skráseta íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini hjá pantumsitaranum, áðrenn íløtini verða seld ella á annan hátt avhend. Landstýrisfólkið ásetur reglur fyri skrásetingina og kann gera undantøk frá skrásetingarskylduni sambært 1. pkt.

Góðkendar móttøkur

§ 8. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um góðkendar móttøkur, og hvussu hesar verða góðkendar.
Stk. 2. Pantumsitarin kann í reglugerð góðkendari av landsstýrisfólkinum áseta reglur um staðseting, atkomuviðurskiftir hølisviðurskiftir og tøknilig krøv fyri góðkendar móttøkur sambært stk. 1.

Samstarv um móttøku av íløtum

§ 9. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, at sølustøð kunnu samstarva við onnur sølustøð og góðkendar móttøkur um felags móttøku av íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini.
Stk. 2. Pantumsitarin kann í reglugerð góðkendari av landsstýrisfólkinum áseta reglur um staðseting, atkomuviðurskiftir, hølisviðurskiftir og tøknilig krøv fyri sølustøð, sum taka ímóti í einum samstarvi sambært stk. 1.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, hvussu samstarv sambært stk. 1 og sølustøð sambært stk. 2 verða góðkend.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið býtir landið, kommunur og býir upp í samstarvsøkir, sum samstarv sambært stk. 1 skal haldast innan fyri, og áseta reglur fyri loyvi at víkja frá samstarvsøkinum.

Eftirlit

§ 10. Framleiðarar og innflytarar hava skyldu at lata landsstýrisfólkinum ella øðrum myndugleika, sum landsstýrisfólkið letur eftirlitsmyndugleikan, allar upplýsingar, sum tørvur er á til at hava eftirlit við pantinnkrevjing og rakstrargjaldi.

Kæra

§ 11. Landsstýrisfólkið kann áseta, at avgerðir sambært løgtingslógini kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Revsing

§ 12. Brot á § 2, stk. 4 og 5, § 5, stk. 1 og 2, § 7, stk. 2, 1. pkt. og § 10 verða revsað við sekt.
Stk. 2. Í reglum ásettum við heimild í løgtingslógini kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir ásettar sambært reglunum verða revsað við sekt.
Stk. 3. Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.
Stk. 4. Brot á § 14, stk. 1 og 2, verður revsað við sekt.

Gildiskoma, skiftisáseting o.a.

§ 13. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. oktobur 2025, og samstundis fer út gildi løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.
Stk. 2. § 12, stk. 4 og § 14 koma í gildi 1. juni 2025 og fara úr gildi 1. oktobur 2025.

Skiftisskipan

§ 14. Frá 1. juni 2025 skulu innflytarar og framleiðarar fyri íløt fevnd av kunngerð um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir gjalda TAKS pantupphæddirnar sambært nevndu kunngerð umframt 0,50 kr. í rakstrargjaldi fyri hvørt ílatið.
Stk. 2. Innflytarar og framleiðarar skulu gjalda TAKS pantið og rakstrargjaldið sambært stk. 1 sambært reglunum í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og lata TAKS tær upplýsingar, sum verða kravdar fyri at áseta og krevja inn pantvirðið og rakstrargjaldið sambært stk. 1.
Stk. 3. TAKS rindar IRF pantið og rakstrargjaldið, sum innkravd eru sambært stk. 2, og letur IRF upplýsingarnar, sum skrásettar eru sambært stk. 2.
Stk. 4. IRF rindar sølustøðum og øðrum, sum hava latið framleiðarum ella innflytarum íløt, pantið fyri íløt fevnd av stk. 1, sbr. stk. 5.
Stk. 5. Innflytarar og framleiðarar geva IRF boð um, hvussu nógv íløt við hvørjum pantvirði talan er um, og hvørjum pantið sambært stk. 4 skal rindast.
Stk. 6. Gevur ein framleiðari ella innflytari IRF boð sambært stk. 5 um at rinda pant fyri fleiri íløt, enn pant og rakstrargjald eru goldin fyri sambært stk. 3, krevur IRF írestandi pantupphæddina inn við rokning.
Stk. 7. IRF rindar innflytarum og framleiðarum rakstrargjaldið sambært stk. 1 aftur fyri hvørt ílat, sum rindað er fyri sambært stk. 4.
Stk. 8. Innflytarar og framleiðarar kunnu søkja IRF um at fáa pant og rakstrargjald afturborið í sambandi við útflutning av íløtum við innihaldi fevndum av kunngerð um íløt, úrdráttir og pant ella í sambandi við proviantering av nevndu íløtum til tollfría og avgjaldsfría nýtslu og sølu.
Stk. 9. Áðrenn IRF kann bera umsøkjarum pant og rakstrargjald aftur sambært stk. 8, skulu umsøkjararnir útvega IRF skjalprógv fyri, at útflutningurin ella provianteringin er farin fram 1. juni 2025 ella seinni. Valdar ivi, ger Umhvørvisstovan av, um skjalprógvini eru nøktandi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Borgarar hava ávísar avbjóðingar av at sleppa av við sínar pantáløgdu fløskur og dósir og at fáa pantið aftur.

Orsøkin til hetta er, at vit við tíðini hava fingið alt fleiri sløg av pantáløgdum íløtum við drykkjuvørum, og at handlar, sum *ikki* selja ávís íløt frá ávísum innflytarum ella føroyskum framleiðarum, ikki hava skyldu at taka ímóti hesum íløtunum og at rinda kundanum pantið aftur. Tað sama er galdandi, um handilin selur drykkjuvøruna, sum hevur verið í íløtunum, sum kundin kemur við, men vøran stavar frá øðrum innflytara og veitara enn tí, sum handilin keypir frá og tí kann hava øðrvísi strikukodu.

Fyri at sleppa av við tað pantálagda ílatið má kundin tí fara aftur í sama handil ella finna ein annan handil, sum selur somu vøru frá sama innflytara ella framleiðara. Tað er ikki altíð, at kundin veit ella minnist, hvar vøran varð keypt, ella hvør handil selur hvørja vøru frá hvørjum innflytara ella framleiðara.

1.2. Galdandi lóggáva

Umhvørvisstovan umsitur galdandi løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15 mai. 2007 um broyting í løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, og kunngerð nr. 54 frá 31. mai 2007 um íløt, úrdráttir og pant, sum broytt við kunngerð nr. 39 frá 16. mai 2011.

Galdandi lóg fevnir um íløt úr glasi, plasti og metali til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir.

Til at flyta inn drykkjuvørur í einnýtisíløtum krevst loyvi frá Umhvørvisstovuni, sum eisini førir lista yvir loyvishavarar, sum hava fingið loyvi til at flyta inn og selja einnýtisíløt, og yvir, hvørjar drykkir loyvishavin hevur loyvi til at flyta inn og selja.

Tá ið pantáløgd íløt verða seld, skulu bæði framleiðarin, innflytarin og sølustaðið krevja inn pant. Á sama hátt skulu framleiðarin, innflytarin og sølustaðið endurrinda pant, tá ið tey taka ímóti nevndu íløtum.

Innflytarar og framleiðarar hava ábyrgdina av, at móttikin íløt verða send til endurvinningar ella endurnýtslu.

Trupulleikin við galdandi lóg er, at handlar bara hava skyldu at endurrinda pant fyri vørur, sum teir sjálvir selja, so kundin má aloftast í fleiri handlar fyri at fáa pantið aftur.

Ein annar vansi við galdandi lóg er, at hon bara fevnir um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir. Rákið í londunum uttan um okkum er, at meira tilfar skal fáast inn til endurvinningar við at panta íløt til fleiri úrdráttir, t.d. djús, saft, smoothie og most.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Høvuðsendamálið við uppskotinum er at gera tað møguligt hjá viðskiftafólki at sleppa av við øll síni pantáløgdu íløt á sama stað, og tí verður ásett sum útgangsstøði, at øll sølustøð, sum selja pantáløgd íløt, hava skyldu til at taka ímóti øllum pantáløgdum íløtum og at rinda pant fyri tey.

Eitt annað endamál við uppskotinum er at fáa landsstýrisfólkinum heimild at áseta í kunngerð, hvørji íløt við hvørjum innihaldi skulu verða pantáløgd. Ásett verður, at lógin fevnir um íløt úr glasi, plasti og metali, og at landsstýrisfólkið nágreinar í kunngerð, júst hvørji íløt við hvørjum innihaldi lógin fevnir um. Á henda hátt verður lógin meira opin við atliti at, hvørji íløt við hvørjum innihaldi kunnu verða pantáløgd, og tað verður skjótari og smidligari at leggja íløt afturat, tá ið tørvur er á tí.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tað nýggja við uppskotinum er, at øll, sum selja brúkarum íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, í útgangsstøðinum fáa skyldu at taka ímóti øllum íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini og at rinda pant fyri tey. Hetta er ein avgerandi broyting sammett við galdandi lóg, sum einans ásetur eina skyldu at taka ímóti og rinda pant fyri tað, sum handilin sjálvur selur.

Henda víðkaða skyldan at taka ímóti og rinda pant fyri øll pantáløgd íløt kann tyngja smærri sølustøð við avmarkaðum plássi, samstundis sum tað kann tyngja pantskipanina fíggjarliga at skula syrgja fyri flutningi frá nógvum smáum sølustøðum. Av tí at tað ikki verður mett at vera neyðugt fyri eina vælvirkandi pantskipan, at øll skulu taka ímóti íløtum, skal landsstýrisfólkið kunna áseta reglur um, at ávís sølustøð skulu vera undantikin skylduni at taka ímóti íløtum, t.d. pylsuvognar, kaffistovur, smá bakarí og sølustøð, sum vanliga ikki selja matvørur, men bara selja nakrar fáar vørur, sum eru fevndar av pantskipanini sambært løgtingslógini, t.d. amboðshandlar og timburhandlar. Heimildin hjá landsstýrisfólkinum at áseta undantøk frá móttøkuskylduni verður tó ikki avmarkað til tað júst nevnda, men kann eisini fevna um onnur sløg av sølustøðum, eitt nú sølustøð hjá bryggjaríum, sum bara selja egna framleiðslu.

Landsstýrisfólkið ásetur reglur um, at sølustøð kunnu taka upp samstarv við onnur sølustøð ella góðkendar móttøkur um felags móttøku og soleiðis verða undantikin skylduni at taka ímóti íløtum. Slíkt samstarv skal góðkennast av landsstýrisfólkinum og ikki hava við sær, at umstøðurnar at sleppa av við íløt versna, t.d. tí at umstøðurnar hjá tí, sum skal taka ímóti, eru verri enn umstøðurnar hjá tí, sum tikið verður ímóti fyri, ella tí at fólk skulu koyra so langt fyri at sleppa av við íløtini, at tey heldur velja at koyra íløtini í rusk.

Galdandi lóg fevnir bara um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir. Rákið í londunum uttan um okkum er, at meira tilfar skal fáast inn til endurvinningar. Hetta verður gjørt við at panta íløt til fleiri vørur, m.a. djús, saft, smoothie og most. Við hesum uppskotinum verður avmarkingin til øl, mineralvatn og leskidrykkir strikað. Í staðin verður uppskotið bara avmarkað til íløt úr glasi, plasti og metali. Hetta gevur landsstýrisfólkinum rásarúm at leggja pant á íløt við einum og hvørjum innihaldi, um tað er ráðiligt í mun møguleikan at endurnýta ella endurvinna tey.

Í Føroyum eru í løtuni 12 virknir loyvishavarar, sum framleiða ella flyta inn íløt. Tí hava vit í veruleikanum 12 ymiskar pantskipanir, tí galdandi lóg ásetur, at hvør loyvishavari tekur sær av sínum egnu íløtum.

Lógaruppskotið byggir á, at *ein* pantumsitari fær alla ábyrgdina av at heinta inn íløt kring landið, skilja tey, gjalda sølustøðunum pant og fáa íløtini send til endurnýtslu og endurvinningar. IRF hevur samtykt at átaka sær skylduna sum pantumsitari sambært tí nýggju løgtingslógini. Hetta er ein stór uppgáva, tí havast skal í huga, at við umleið 15 miliónum pantáløgdum íløtum, sum sambært kanningum hjá IRF er minsta nøgdin, sum væntast kann í 2025, skal IRF handfara umleið 68.000 íløt hvønn gerandisdag í árinum.

Pantumsitarin fær eitt rakstrargjald fyri hvørt framleitt og innflutt ílat, sum skal rinda fyri útreiðslurnar, sum pantumsitarin hevur av umsiting, rakstri, og íløgum í sambandi við pantskipanina. Rakstrargjaldið fer væntandi at liggja um 50 oyru fyri hvørt ílatið tað fyrsta árið.

Fyri at leggja upp fyri ivanum um, hvør innflytari eigur hvat ílat, har tveir ella fleiri innflytarar hava innflutt ílat við somu strikukodu, og fyri at tryggja, at pantið og rakstrargjaldið fyri øll framleidd og innflutt íløt verða goldin pantumsitaranum, samstundis sum tey verða skrásett í skipanini, fer skrásetingin fram umvegis netið hjá TAKS. TAKS fer at krevja gjøldini inn sambært reglunum í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Reglurnar áseta millum annað, hvussu gjøldini skulu rindast, gjaldfreistir, rentur og heimildir hjá TAKS at krevja peningin inn.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið í almennari hoyring og ligið á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum og Føroya landsstýri í tíðarskeiðinum 6. desember 2023 til 5. januar 2024.

Uppskotið hevur harumframt verið til ummælis hjá:

Handilsvinnufelagnum
IRF
TAKS
Rúsdrekkasølu Landsins
Fíggjarmálaráðnum
Løgmansskrivstovuni
Umhvørvisstovuni
Føroya Kærustovni

Inn komu ummælir frá Umhvørvisstovuni, Matvørubúðini í Nólsoy, TAKS, Rúsdrekkasølu Landsins, Handislvinnufelagnum, Føroya Bjór og Føroya Kærustovni.

Eftir áheitan frá Handilsvinnufelagnum er ein nýggj áseting í § 3, stk. 6, har landsstýrisfólkið ásetur reglur fyri eina nevnd, sum hevur til uppgávu at ráðgeva pantumsitaranum í sambandi við íløgur og rakstur. Annars førdu ummælini til, at nakrar orðingar vórðu broyttar fyri betri greidleika.

Víst verður annars til fylgiskjal 1, har ummælini verða gjøgnumgingin.

Fyri at síggja ummælini í fullum líki, verður víst til sjálv ummælini, ið somuleiðis eru viðløgd sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. IRF fær væntandi ikki tørv á eyka fígging, við tað at pantskipanin verður fíggjað við einum rakstrargjaldi, sum innflytarar og framleiðarar gjalda.

TAKS metir, at arbeiðið at sjóða sína skipan saman við skrásetingarskipanini hjá pantumsitaranum fer at kosta um 500.000 kr., sum pantskipanin skal gjalda. TAKS metir seg ikki fáa tørv á eyka fígging eftir henda byrjanarkostnaðin.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umsitingarbyrðan hjá IRF veksur, við tað at tað fer at liggja á pantumsitaranum at umsita og reka pantskipanina.

TAKS metir ikki, um umsitingarbyrðan hjá TAKS veksur nevningarvert, tá ið skipanin hjá TAKS og skrásetingarskipanin hjá pantumsitaranum eru samansjóðaðar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Innflytarar fara at skula gjalda pantskipanini pant fyri øll íløt, sum innflutt verða, ella sum føroyskir framleiðarar fylla á. Har ið innflytarin ella framleiðarin eftir galdandi lóggávu situr eftir við panti, sum brúkarin ikki krevur inn aftur (vantandi returpant), verður tað nú pantskipanin, sum fer at sita eftir við hesum peninginum. Tað vantandi returpantið lá í 2022 um sløk 10 % av góðum 13 milliónum íløtum. Hetta svarar til góðar 4 milliónir krónur. Pantumsitarin fær skyldu at brúka henda peningin til at fíggja pantskipanina við saman við rakstrargjaldinum og møguligum yvirskoti av at selja plast, aluminium og glas. Tað vantandi returpantið kann tó væntast at minka, tá ið kundin sleppur av við øll síni íløt á sama stað.

Innflytarar og framleiðarar skulu gjalda pantumsitaranum rakstrargjald fyri kostnaðin av pantskipanini. Hetta rakstrargjaldið verður at dagføra árliga og fer væntandi at liggja um 50 oyru fyri hvørt ílatið fyrsta árið.

Skyldan hjá sølustøðum veksur, við tað at tey nú fara at skula taka ímóti øllum pantáløgdum íløtum. Sølustøð skulu tó ikki skilja íløt eftir øðrum enn tilfari, so at glas ikki verður blandað við plastfløskur og aluminiumsdósir. Eftir ætlan fara plast og aluminium í sama sekk. Pantumsitarin fær skyldu at heinta íløt við slíkum títtleika, at íløt ikki hópast upp hjá teimum einstøku sølustøðunum.

Arbeitt verður eisini við at finna eina loysn, sum ger tað møguligt hjá sølustøðum við ongari maskinu at lesa strikukodur á íløtum av við eini app á telefonini, so at tey síggja, um eitt ílat hevur pantvirði ella ikki. Eitt nú kunnu vín- og brennivínsfløskur, sum keyptar verða tollfrítt uttanlands, einki pantvirði hava í Føroyum.

Samanumtikið verður roknað við, at tann nýggja pantskipanin verður minni fløkjaslig at umsita hjá sølustøðunum enn verandi skipan, serliga tí at sølustøðini ikki skulu skilja eftir veitara og merki, men bara eftir tilfari.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið fer væntandi at vaksa um nøgdina av íløtum, sum latin verða inn til endurvinningar og endurnýtslu, við tað at tað fer at fevna um fleiri vørusløg og returprosentið væntandi verður hægri, við tað at møguleikin at sleppa av við øll pantáløgd íløt á sama stað verður betri. Returprosentið var 90 % í 2022. Samanumtikið verður mett, at lógaruppskotið gagnar umhvørvinum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin millumtjóðasáttmáli er á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við hoyvíkssáttmálan (*sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin*), evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið ásetir, at sektast kann fyri fylgjandi brot sambært § 12:
§ 2, stk. 4 og 5. Um innflytarar og framleiðarar ikki gjalda pant og rakstrargjald fyri íløt fevnd av pantskipanini.
§ 5, stk. 1 og 2. Um sølustøð við móttøkuskyldu nokta at taka ímóti íløtum fevndum av pantskipanini.
§ 7 stk. 2, 1. pkt. Um íløt verða seld ella avhendað, áðrenn tey eru skrásett í pantskipanini.
§ 10. Um innflytari ella framleiðari noktar at geva eftilitsmyndugleikanum umbidnar upplýsingar.
§ 14, stk. 1 og 2. Um innflytarar og framleiðari ikki gjalda pant og rakstrargjald til TAKS ella ikki geva TAKS umbidnar upplýsingar.
Í reglum ásettum við heimild í løgtingslógini kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir ásettar sambært reglunum verða revsað við sekt.
Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

2.11. Skattir og avgjøld
Pantupphæddin, sum sambært galdandi lóg er ásett í kunngerð, verður sambært lógaruppskotinum ásett beinleiðis í § 2, stk. 3, í løgtingslógini.

Orsøkin er, at har ið galdandi lóg bara krevur, at privatir partar krevja inn og lata pant sínámillum, verður tað sambært lógaruppskotinum TAKS, sum krevur pantið inn og síðan letur pantskipanini tað.

Pantið skal sostatt sambært lógaruppskotinum gjaldast tí almenna, og tí er talan um eitt avgjald. Pantupphæddin fer ikki til at rinda fyri útreiðslur, sum beinleiðis standast av at handfara íløt, men verður nýtt til at stýra atferðini hjá fólki, so at íløtini koma aftur í ringrásina við endurnýtslu og endurvinning og ikki enda sum burturkast ella verða tveitt í náttúruna.

2.12. Gjøld
Pantumsitarin fær heimild at krevja rakstrargjald frá innflytarum og framleiðarum fyri sínar útreiðslur av at umsita og reka pantskipanina. Rakstrargjaldið fer væntandi at liggja um 50 oyru fyri hvørt ílatið. Gjaldið skal dagførast minst eina ferð um árið.

Pantumsitarin fær heimild at krevja gjald frá sølustøðum og góðkendum móttøkum fyri kostnaðin av tilfari at handfara íløt við. Ætlanin er, at gjaldið skal rindast aftur, tá pantumsitarin hevur fingið tilfarið (t.d. kassar ella posar) aftur.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Í § 2, stk. 4 og 5, er ásett, at allir innflytarar og framleiðarar skulu gjalda pant og rakstrargjald fyri íløt fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini.

Í § 5 er ásett, at sølustøð og móttøkur skulu taka ímóti íløtum og rinda pant fyri tey. Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta upplatingartíðir fyri, nær móttøkur og sølustøð skulu taka ímóti íløtum. Landsstýrisfólkið fær eisini heimild at áseta, hvussu kunnast skal um pantið, tá ið íløt vera seld ella marknaðarførd.

Sambært § 6 skulu sølustøð, móttøkur og onnur, sum savna íløt saman til at avhenda pantumsitaranum, handfara íløtini sambært reglugerð hjá pantumsitaranum, m.a. um rit- og tólbúnað og maskinur, sum brúkast skulu. Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta, at pantumsitarin kann krevja gjald fyri kostnaðin av t.d. serliga framleiddum posum til at savna inn íløt til pantskipanina. Landsstýrisfólkið fær eisini heimild at áseta forboð fyri útflutningi og innflutningi av brúktum íløtum.

Í § 7 er ásett, at sølustøð, við móttøkuskyldu sambært § 5, góðkendar móttøkur, innflytarar og framleiðarar hava skyldu at skráseta seg hjá pantumsitaranum, og framleiðarar og innflytarar skulu skráseta síni íløt hjá pantumsitaranum.

Sambært § 8 og 9 fær landsstýrisfólkið heimild at áseta, at góðkendar móttøkur, samstarv um móttøku av íløtum og sølustað, sum tekur ímóti í einum samstarvi, skulu góðkennast, eitt nú við atliti at staðseting og atkomu- og hølisviðurskiftum.

Í § 10 er ásett, at innflytarar og framleiðarar skulu geva eftirlitsmyndugleikanum (sum verður Umhvørvisstovan) allar upplýsingar, sum tørvur er á til eftirlitið við pantinnkrevjing og rakstrargjaldi.

Í § 14 er ásett, at innflytarar og framleiðarar skulu gjalda pant og rakstrargjald frá 1. juni 2025, fýra mánaðir áðrenn restin av løgtingslógini kemur í gildi. Ásett verður eisini, at

innflytarar og framleiðarar skulu lata TAKS tær upplýsingar, sum kravdar verða til áseting og innkrevjing av panti og rakstrargjaldi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Tær flestu ásetingarnar í løgtingslógini heimila landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur. Orsøkin til henda leistin er, at lógin skal vera støði undir eini nýggjari og dynamiskari pantskipan, sum skal leggja upp fyri broytiligum mannagongdum, tøkni, vøruúrvali, móttøkuskyldu og undantøkum og gjaldsupphæddum. Hetta so at talan verður um eina munadygga skipan við so lítlum kostnaði sum gjørligt. Tað verður ikki mett ráðiligt at læsa slík viðurskifti føst í løgtingslógini, so at farast má í Løgtingið, hvørja ferð tørvur verður á tillagingum.

Av tí at tað mesta í tí nýggju pantskipanini bregður frá galdandi pantskipan, er ilt at meta um, hvussu skipanin fer at roynast, tá ið hon verður sett í verk. Samstundis skal IRF gera kostnaðarmiklar íløgur í hølir, maskinur og ritbúnað og seta fólk at umsita og reka skipanina. Ikki fyrr enn IRF hevur gjørt hetta fyrireikandi arbeiðið og borið útreiðslurnar av hesum og av íløgum í pantskipanina, vita vit við størri vissu, hvussu ásetingarnar í løgtingslógini kunnu fyllast út í kunngerð. IRF metir tað ikki vera ráðiligt at átaka sær hesar útreiðslurnar, fyrr enn Løgtingið hevur samtykt lógina. Hetta so at vissa er fyri, at útreiðslurnar ikki verða bornar til fánýtis orsakað skiftandi politiskum raðfestingum.

Uppskot til kunngerð er hjálagt lógaruppskotinum, so síggjast kann, hvussu heimildirnar sambært løgtingslógini væntandi fara at verða brúktar.

Greinar har heimildir eru lagdar til landstýrisfólkið at gera reglur ella góðkenna reglur eru hesar:

§ 2, stk. 1-2 og 5. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um pantskipan. Landsstýrisfólkið ásetur, hvørji íløt eru fevnd av pantskipanini. Landsstýrisfólkið ásetur rakstrargjald.
§ 3, stk. 1-6. Landsstýrisfólkið ásetur pantumsitaran og skyldur pantumsitarans mótvegis pantskipanini. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um ráðgevandi pantnevnd.
§ 4, stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um afturbering av panti og rakstrargjaldi.
§ 5, stk. 1-3. Landsstýrisfólkið ásetur undantøk frá móttøkuskyldu, treytir fyri rindan av panti og reglur fyri móttøkutíðir, kunning um pant og gjaldsháttir fyri rindan av panti til viðskiftafólk.
§ 6, stk. 1-4. Landsstýrisfólkið góðkennir reglugerð um handfaring av íløtum og góðkennir gjald fyri kostnað av tilfari til handfaring av íløtum. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um afturbering av gjaldi fyri tilfari til handfaring av íløtum og reglur um útflutning og innflutning av brúktum íløtum.
§ 7, stk. 1 og 2. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um skráseting av innflytarum, framleiðarum og íløtum.
§ 8, stk. 1 og 2. Landsstýrisfólkið ásetur reglur um og góðkennir móttøkur.
§ 9, stk. 1-4. Landsstýrisfólkið góðkennir samstørv millum sølustøð og ásetur reglur um samstørv millum sølustøð um felags móttøku. Landsstýrisfólkið kann býta landið upp í samstarvsøkir.
§ 11, stk. 1. Landsstýrisfólkið kann leggja kærumyndugleikan til Føroya Kærustovn.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd at privatari ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	ja
Umhvørvisligar avleiðingar	ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Nr. 1: Ein *framleiðari* er ein, sum í Føroyum fyllir vøru, sum er fevnd av pantskipanini, á íløt, sum eru fevnd av pantskipanini. Ein framleiðari kann ikki selja ella á annan hátt avhenda íløtini, fyrr enn tey eru skrásett hjá pantumsitaranum sambært § 7, stk. 2.

Nr. 2: Ein *góðkend móttøka* er ein móttøka, sum tekur ímóti íløtum, sum eru fevnd av pantskipanini, og sum ikki er á einum sølustað, sum hevur móttøkuskyldu sambært § 5 og er góðkent sambært § 8. Eitt dømi um hetta er, at sølustøð við móttøkuskyldu taka seg saman um at gera eina felags góðkenda móttøku at taka ímóti íløtum fyri seg sambært § 9, og at henda felags móttøkan liggur fyri seg sjálva og sostatt ikki er staðsett hjá nøkrum av sølustøðunum. Tað er ikki avmarkað í løgtingslógini, hvør ið kann seta slíka móttøku á stovn.

Nr. 3: Ein *innflytari* er ein, sum flytur inn vøru í íløtum, sum eru fevnd av pantskipanini. Ein innflytari kann ikki selja ella avhenda innflutt íløt, fyrr enn tey eru skrásett hjá pantumsitaranum sambært § 7, stk. 2.

Nr. 4: *Pantumsitarin* hevur skyldu til at umsita og reka pantskipanina sambært løgtingslógini og avtaluni, sum sambært § 3, stk. 1, verður gjørd millum hann og landsstýrisfólkið.

Nr. 5: *Rakstrargjald* er gjald fyri hvørt ílat, sum er fevnt av pantskipanini, við vøru, sum er fevnd av pantskipanini. Gjaldið skal brúkast til at rinda fyri útreiðslurnar, sum pantumsitarin hevur av at umsita, reka og gera íløgur í pantskipanina. Rakstrargjaldið verður ásett av nýggjum í minsta lagi eina ferð um árið sambært § 2, stk. 5, so at tað samsvarar við útreiðslurnar hjá pantumsitaranum.

Nr. 6: Eitt *sølustað* er eitt og hvørt stað, har ið íløt, sum eru fevnd av pantskipanini, við innihaldi, sum er fevnt av pantskipanini, verða seld endaligum brúkarum. Dømi um hetta eru fyrst og fremst vanligir matvøruhandlar, men øll støð, har ið pantálagdar vørur í pantáløgdum íløtum verða seldar brúkarum, eru sølustøð sambært løgtingslógini. Hinvegin eru støð, sum bara selja virkjum o.ø., sum eru skrásett í vinnuskránni hjá TAKS, pantálagda vøru í pantáløgdum íløtum, ikki sølustøð sambært løgtingslógini, tí hetta verður ikki roknað sum søla til brúkarar. Dømi um hetta eru heilsølur, sum vanliga bara selja til handlar og onnur virkir.

Til § 2

Stk. 1 og 2 heimila landsstýrinum at áseta í kunngerð, hvørji íløt pantskipanin skal fevna um. Til dømis kunnu íløt til brennivín, vín, óblandaða saft, djús, most o.a., sum galdandi lóggáva ikki fevnir um, takast við.

§ 2 er bara avmarkað til íløt úr metali, plasti og glasi og kann tí fevna um onnur íløt enn íløt til drykkjuvørur. Til dømis kann hugsast, at íløt til matvørur einaferð fara at kunnu verða tikin við, um tað verður mett ráðiligt við atliti at møguleikanum at endurnýta ella endurvinna slík íløt.

Sambært galdandi kunngerð er pantið 2 kr. fyri íløt, sum taka upp í 0,5 litrar, og 4 kr. fyri íløt, sum taka oman fyri 0,5 litrar. Ætlanin er ikki at broyta hetta í tí nýggju kunngerðini.

Pantupphæddin, sum sambært galdandi lóg er ásett í kunngerð, verður sambært hesi løgtingslógini ásett beinleiðis í § 2, stk. 3.

Orsøkin er, at har ið galdandi lóg bara krevur, at privatir partar krevja inn og lata pant sínámillum, verður tað sambært hesi løgtingslógini TAKS, sum krevur pantið inn og síðan letur pantskipanini tað.

Pantið skal sambært løgtingslógini gjaldast tí almenna, og tí er talan um eitt avgjald. Pantupphæddin fer ikki til at rinda fyri útreiðslur, sum beinleiðis standast av at handfara íløt, men verður nýtt til at stýra atferðini hjá fólki, so at íløtini koma aftur í ringrásina við endurnýtslu og endurvinning og ikki enda sum burturkast ella verða tveitt í náttúruna.

Sambært stk. 4 og 5 hava innflytarar skyldu at gjalda pantskipanini pant fyri hvørt innflutt ílat við innihaldi, sum verður fevnt av pantskipanini sambært løgtingslógini. Føroyskir framleiðarar fáa somuleiðis skyldu at gjalda pantskipanini pant fyri hvørt ílat, sum eftir sínum innihaldi verður fevnt av pantskipanini sambært løgtingslógini. Goldið verður til pantskipanina gjøgnum TAKS sambært § 4, stk. 2.

Hetta bregður frá galdandi pantskipan, har innflytarin og framleiðarin, sum krevja pant frá sølustøðunum, sita eftir við pantinum, um brúkarin ikki letur íløtini inn aftur og fær pantið aftur. Nú verður tað pantskipanin, sum fer at sita eftir við hesum peninginum.

Rakstrargjaldið verður goldið pantumsitaranum gjøgnum TAKS samstundis við pantið sambært § 4. stk. 2. Rakstrargjaldið er eitt fast gjald fyri hvørt ílat, sum skal rinda fyri útreiðslurnar, sum pantumsitarin hevur av at umsita, reka og gera íløgur í pantskipanina.

IRF metir, at rakstrargjaldið fer at liggja um 50 oyru fyri hvørt ílatið tað fyrsta árið.

Ætlanin er, at pantumsitarin skal áseta rakstrargjaldið árliga, og at innflytarar og framleiðarar skulu hoyrast, áðrenn rakstrargjaldið verður sett í verk.

Mannagongdin verður ætlandi henda:

1. Rakstrargjaldið verður útroknað, tá ið roknskaparárið er uppgjørt. Ársfrágreiðing við uppskoti til rakstrargjald og rakstrarætlan fyri tíðarskeiðið fram til næstu áseting verður gjørd síðst í mars.
2. Ársfrágreiðingin verður send innflytarum og framleiðarum til ummælis síðst í mars.
3. Ummælisfreistin verður ein mánað – frá síðst í mars til síðst í apríl.
4. Landsstýrisfólkið ásetur rakstrargjaldið fyrst í mai.
5. Framleiðarar, innflytarar og TAKS fáa fráboðan um rakstrargjaldið um miðjan mai.
6. Rakstrargjaldið fær gildi 1. juni.

Pantumsitarin fær væntandi inntøku av avlopi av vantandi returpanti og møguligum avlopi av at selja plast, aluminium og glas. Slíkar inntøkur verða at taka við, tá ið rakstrargjaldið verður ásett.

Til § 3

Eftir galdandi lóggávu hava innflytarar og framleiðarar ábyrgdina av egnum íløtum og skulu krevja og lata pant fyri tey, savna tey saman og fáa tey til endurvinningar ella endurnýtslu.

Løgtingslógin, stk. 1, heimilar, at henda ábyrgdin í staðin verður løgd á *ein* pantumsitara, sum skal savna øll íløt saman, rinda sølustøðum og móttøkum pant og fáa íløtini til endurvinningar ella endurnýtslu.

Landsstýrisfólkið skal sambært avtalu við viðkomandi kunna lata einum almennum myndugleika, einum kommunalum felagsskapi ella einum privatum felag ella felagsskapi, sum ikki miðar eftir vinningi, hesar skyldurnar at sita fyri. Við tað at tað ikki verður ásett í sjálvari løgtingslógini, hvør ið er pantumsitari, slepst undan at broyta løgtingslógina, berst okkurt á, sum ger, at pantumsitarin ikki fær hildið fram at røkja sínar skyldur, so at tørvur verður á at finna ein nýggjan pantumsitara.

Umhvørvismálaráðið hevur avrátt við leiðsluna og nevndina í IRF, at IRF átekur sær leiklutin at umsita, reka og gera íløgur í pantskipanina sum pantumsitari.

Landsstýrisfólkið fær, sambært stk. 2, heimild at áseta reglur um stuðul til frama fyri pantskipanina. Ásetingin skal gera tað møguligt hjá pantumsitaranum at stuðla t.d. keypi av komprimatori, um tað verður mett at betra um pantskipanina, samstundis sum útreiðslurnar hjá pantumsitaranum av skipanini minka ella í øllum førum ikki vaksa. Eisini kann stuðulin nýtast til t.d. heilt ella lutvíst at rinda sølustaði fyri leigu av eyka goymslurúmi ella bingju at

goyma íløt í, um hetta er minnið kostnaðarmikið sammett við flutningskostnaðin av at skula heinta íløt títtari.

Pantumsitarin kann seta treytir fyri at rinda pant til sølustøð sambært stk. 4. Tó skal landsstýrisfólkið fyrst áseta karmarnar fyri, hvørjar treytirnar kunnu vera. Hesar treytir kunnu t.d. vera, at íløtini skulu hava strikukotu á, so ílatið kann lesast av maskinu ella skannara ella at sølustøð, sum hava komprimator, sum kroystir íløtini á staðnum, skulu fylgja teimum mannagongdum, sum pantumsitarin krevur í sambandi við avtalu um beinleiðis avrokning av íløtum gjøgnum dáta.

Ætlanin er, sambært stk. 6, at landsstýrisfólkið skal seta eina nevnd við umboðum fyri framleiðarar, innflytarar og sølustøð at ráðgeva pantumsitaranum í sambandi við íløgur og rakstur. Endamálið við ráðgevingini verður, at pantskipanin skal verða væl rikin, samstundis sum kostnaðurin verður hildin niðri. Nevndararbeiðið verður ólønt og uttan samsýning, og nevndin verður væntandi mannað við trimum limum. Júst hvussu nevndin verður skipað og fer at arbeiða, verður endaliga avrátt við Handilsvinnufelagið og IRF, tá ið løgtingslógin er samtykt.

Til § 4

Ásett er í stk. 1, at pant og rakstrargjald verða kravd inn gjøgnum skipanina hjá TAKS. Løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi verður avgerandi fyri, hvussu gjøldini skulu rindast, gjaldfreistir, rentur og heimildirnar hjá TAKS at krevja peningin inn.

Gjaldfreistirnar sambært løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi eru:

- Fyri framleiðarar falla gjøldini til gjaldingar tann 28. í mánaðinum, eftir at vøran er framleidd, sbr. §3 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi.
- Fer framleiðslan fram á einum fríøki sambært § 18 b í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, falla gjøldini til gjaldingar, tá ið vøran verður tikin av fríøkinum.
- Fyri innflytarar, sum hava tollkreditt, verða gjøldini at rinda tann 28. í mánaðinum, eftir at tikið er ímóti vøruni, sbr. § 2 í kunngerð nr. 37 frá 2004 um tollkreditt.
- Innflytarar, sum ikki hava tollkreditt, skulu rinda, tá ið tollavgreiðslan fer fram sambært § 13, stk. 1, í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll.

Stk. 3 heimilar pantumsitaranum at krevja vantandi pant og rakstrargjald frá einum innflytara ella framleiðara, um viðkomandi hevur goldið pantskipanini færri pengar enn pantskipanin hevur rindað fyri móttikin íløt, sum eru skrásett hjá viðkomandi. Hendan heimildin kann hava týdning tað fyrsta árið, pantskipanin er virkin, tí tað kunnu verða fleiri íløt í umferð enn goldið er fyri til pantskipanina, men tá pantskipanin hevur virkað í nakrar mánaðir, er minni sannlíkt, at pantumsitarin fer at hava tørv á at nýta heimildina.

Fyri at tað skal vera møguligt at flyta út vøru í íløtum fevndum av pantskipanini sambært løgtingslógini, uttan at pant og rakstrargjald tyngja kappingarførið, skal pantumsitarin kunna bera pant og rakstrargjald aftur í sambandi við proviantering, tollfría sølu og útflutning.

Endamálið við treytunum fyri afturbering sambært stk. 4 er, at útflytarin skal kunna skjalprógva ella á annan hátt gera sannlíkt, at íløtini ikki koma aftur í føroysku pantskipanina. Treytirnar kunnu til dømis sigast at vera loknar, um skjalprógv er fyri, at vøran er farin av landinum ella vøran er seld skipi sum proviantur, og skipið ikki kemur aftur til Føroya fyribils, t.d. einum ferðamannaskipi, sum bara er í Føroyum eina ferð um árið. Hinvegin kunnu treytirnar ikki sigast at vera loknar, um vøran er seld skipi, sum bara leggur at í føroyskari havn og tí hevur skyldu at lata føroysku burturkastsskipanini alt burturkast. Íløt, sum seld verða slíkum skipum, enda við stórum sannlíkindum aftur í føroysku pantskipanini.

Í sambandi við tollfría sølu og proviantering til skip í fastari rutu millum Føroyar og útlond kann vera ilt at skilja ímillum, hvat ið endar í føroysku pantskipanini og ikki. Í sambandi við arbeiðið at áseta neyvari treytir fyri afturbering, og áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, fara IRF og stjórnarráðið at umrøða henda spurningin við vinnuna.

Til § 5

Meginreglan sambært stk. 1 er, at øll sølustøð, sum selja íløt, sum eru fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, og góðkendar móttøkur hava skyldu at taka ímóti øllum íløtum, sum eru fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, og rinda pant fyri tey,

Henda meginreglan verður tó ikki mett ráðilig í øllum førum, við tað at hon kann tyngja ávís sølustøð órímiliga. Eitt nú um pylsu- og matvognar, kaffistovur og bakarí, sum skjótt høvdu fingið plásstrot, um tey komu undir móttøkuskyldu sambært meginregluni, eins og spurnartekn kann setast við, hvussu tað hevði ávirkað reinførið, um matgerð og víðfevnd fløskumóttøka skuldu farið fram á sama tronga plássi. Tí fer at bera til at veita slíkum støðum undantak frá meginregluni um móttøkuskyldu.

Eisini onnur fyrilit tala fyri at veita ávísum sølustøðum fast undantak frá móttøkuskylduni. Mett verður, at innsavningin og flutningurin av íløtum hevði gjørst spjaddari og dýrari fyri pantskipanina enn neyðugt, um øll sølustøð, sum verða fevnd av pantskipanini sambært løgtingslógini, fingu skyldu at taka ímóti íløtum. Sum dømi kunnu nevnast sølustøð, sum ikki hava tað sum vinnuveg at selja mat- og drykkjuvørur, hóast tey kunnu hava eitt avmarkað úrval av eitt nú drykkjuvørum og góðgæti við kassan. Hetta sæst eitt nú ofta í timbur- og amboðshandlum. Eisini matstovur og barrir koma undir hesi fyrilitini fyri miðsavnan heldur enn spjaðing. Tær selja vanliga ikki drykkjuvørur í ílati at taka við sær, hóast tær hava loyvi til tað. Tað er kortini eingin treyt fyri eini vælvirkandi pantskipan, at matstovur og barrir verða fevndar av meginregluni um móttøkuskyldu.

Eftir umbøn frá føroyskum framleiðara verður umhugsað at sleppa sølustøðum hjá bryggjaríum undan fullari móttøkuskyldu, so at hesi bara fáa skyldu at taka ímóti íløtum frá egnari framleiðslu.

Ætlanin er at veita hesum sølustøðum fult undantak frá allari móttøkuskyldu:

1) matstovum,
2) barrum,
3) kaffistovum,
4) pylsu- og matvognum/-bilum,
5) sølustøðum við loyvi at selja rúsdrekka við meira enn 5,8 rúmprosentum av alkoholi á framleiðslustaðnum,

6) sølustøðum, sum vanliga ikki ella bara í sera avmarkaðan mun selja matvørur og bara selja heilt fáar vørur, sum eru fevndar av pantskipanini sambært løgtingslógini, t.d. amboðshandlum, timburhandlum og venjingarmiðstøðum,
7) bakaríum, sum í høvuðsheitum ikki selja annað enn bakstur, og
8) sølubúðum til hissinissølu í sambandi við eitt nú bygdarstevnur, ítróttatiltøk, tónleikatiltøk og sølustevnur.

Landsstýrisfólkið skal, sambært stk. 2, kunna áseta reglur fyri, í hvørjum førum eitt sølustað hevur skyldu at taka ímóti og rinda pant fyri eitt ílat. Er t.d. strikukodan á ílatinum ólesandi, ella ílatið so illa farið, at fløskuautomatin ikki fær handfarið og lisið strikukoduna, kann sølustaðið sýta fyri at rinda pant fyri ílatið.

Galdandi lóg um pant á íløtum hevur ongar ásetingar um, nær ella hvussu leingi sølustøð ella móttøkur skulu taka ímóti íløtum. Løgtingslógin heimilar í stk. 3 landsstýrisfólkinum at áseta krøv hesum viðvíkjandi.

Landsstýrisfólkið hevur eisini heimild at áseta reglur fyri, hvussu kunnast skal um pantvirðið á íløtum á prísskeltum, kvittanum og í sambandi við marknaðarføring.

Til § 6

Í sambandi við handfaringina av íløtum skal pantumsitarin sambært stk. 1 kunna áseta reglur, góðkendar av landsstýrisfólkinum, fyri, hvørjar posar og kassar sølustøð og móttøkur skulu brúka, og hvussu íløtini skulu skiljast. Plast og aluminium skulu ætlandi í sama posa, og íløt úr glasi skulu í ein posa ella kassa fyri seg.

Reglurnar, sum pantumsitarin skal kunna áseta, skulu eisini kunna fevna um maskinur og ritbúnað, sum sølustøð og móttøkur kunnu ella skulu brúka. Hetta verður væntandi neyðugt til at tryggja eina vælvirkandi pantskipan, har pantumsitarin kann miðstýra øllum dagføringum av fløskuautomatum og øðrum ritbúnaði, so hvørt sum nýggj íløt koma á marknaðin, og so at gjørligt verður at avrokna beinleiðis við sølustøð og móttøkur við støði í uppgerð frá fløskuautomatum, um avtala er fingin í lag við pantumsitaran at kroysta íløtini á staðnum.

Pantumsitarin skal veita sølustøðum og móttøkum posar ella kassarnar, sum skiljast skal í, og skal, sambært stk. 2, kunna krevja gjald fyri framleiðslukostnaðin. Gjaldið skal ætlandi endurrindast, tá ið posin ella kassin verður fingin pantumsitaranum aftur. Til dømis verða posarnir framleiddir við framhaldandi QR-kodum. Tá ið ein posi verður fingin pantumsitaranum, skal pantskipanin skráseta QR-koduna sum knýtta at viðkomandi, sum læt pantskipanini posan. Tá ið so íløtini í posanum eru upptald hjá pantumsitaranum, verða pantið á íløtunum og kostnaðurin av posanum ætlandi endurrindað viðkomandi sambært stk. 3, sum læt pantskipanini posan.

Føroyskir innflytarar mugu gjalda danskt pant fyri at fáa vøru, sum er merkt við donskum pantmerki, til Føroya. Umhvørvismálaráðið og Miljøministeriet eru í samráðingum um møguleikan hjá føroyskum innflytarum at fáa danska pantið endurrindað móti skjalprógvi fyri, at vøran er komin til Føroya. Ein grundleggjandi treyt fyri, at danska pantið kann verða endurrindað føroyskum innflytarum, er, at íløtini ikki enda aftur í donsku pantskipanini. Fyri

at byrgja upp fyri møguleikanum fyri, at íløtini enda aftur í donsku pantskipanini, verður sambært stk. 4 ætlandi bannað at flyta út brúkt íløt uttan við loyvi frá landsstýrisfólkinum.

Tað kann eisini setast bann fyri innflutningi av brúktum íløtum, fyri at leggja upp fyri møguleikanum at flyta inn brúkt íløt og fáa pant fyri tey, sjálvt um pant ikki er rindað til pantskipanina fyri hesi íløt.

Til § 7

Av umsitingarávum verður neyðugt við reglum um, at allir viðkomandi partar skulu skráseta seg hjá pantumsitara sambært stk.1.

Fyri at tryggja, at íløt ikki koma á marknaðin, fyrr enn tey eru skrásett í pantskipanini, er neyðugt, at framleiðarar og innflytarar skulu skráseta íløtini sambært stk. 2, áðrenn tey kunnu seljast ella á annan hátt avhendast. Verða íløt ikki skrásett, áðrenn tey fara á marknaðin, ber ikki til at dagføra fløskuautomatir, skannarar og annan ritbúnað við strikukodum og øðrum upplýsingum, so at hesi kunnu lesa íløtini av og rinda pant fyri tey.

Undantak verður ætlandi ásett fyri skrásetingarskyldu av íløtum, sum fólk hava við sær í viðførinum frá uttanlandsferðum, tá tað vildi verið umsitingarliga tyngjandi fyri ferðafólk og óneyðugt í mun til ta lítlu mongdina, talan er um.

Til § 8

Ásetingin heimilar, at góðkendar móttøkur, sum ikki eru staðsettar hjá sølustøðum, kunnu vera partur av pantskipanini. Sambært § 9 kunnu sølustøð samstarvast um felags móttøku og her kann tað hugsast, at sølustøð velja at leggja eina felags móttøku fyri seg sjálva. Fyri at hendan móttøkan skal vera fevnd av rættindunum í løgtingslógini at fáa síni íløt avheintað og avroknað av pantskipanini, má hon fyrst góðkennast av landsstýrisfólkinum við at lúka krøvini um staðseting, hølir, tøkni og upplatingartíðir ásett av landsstýrisfólkinum.

Til § 9

Fyri at tryggja munadygga og miðsavnaða innsavning av íløtum verður landsstýrisfólkinum heimilað í stk. 1 at áseta reglur fyri samstarvi millum sølustøð, har eitt sølustað tekur ímóti íløtum fyri samstarvsfelagarnar. Fyri at tryggja, at umstøðurnar hjá kundunum at sleppa av við síni íløt ikki versna, skal landsstýrisfólkið sambært stk. 2 og 3 góðkenna samstarvið og tøknilig viðurskiftir, staðseting og atkomu- og hølisviðurskiftir hjá sølustøðum, sum skulu taka ímóti íløtum fyri onnur sølustøð. Maskinur og ritbúnaður hjá slíkum sølustøðum skulu lúka treytirnar sambært § 6 fyri handfaring av íløtum.

Fyri at tryggja, at umstøðurnar at sleppa av við íløt ikki versna munandi, við tað at ov langt verður millum eina felags móttøku sambært § 9 ella eina góðkenda móttøku sambært § 8 og sølustøð, sum hesar móttøkurnar samstarva við, ella at tað verða ov fá, sum taka ímóti í einum øki í mun til fólkatalið, verður landsstýrisfólkinum heimilað í stk. 4 at býta býir, kommunur og landið annars upp í økir, sum samstarvið skal haldast innan fyri.

Til § 10

Fyri at kunna hava eftirlit við inngjaldi av panti og rakstrargjaldi skal eftirlitsmyndugleikin, sum verður Umhvørvisstovan, kunna krevja ávísar upplýsingar frá innflytarum og framleiðarum. Eitt nú skjalprógv fyri nøgd, slag og stødd á íløtum, sum pant og rakstrargjald skal gjaldast fyri.

Til § 11

Landsstýrisfólkið verður kærumyndugleiki, tað fyrsta árið løgtingslógin er í gildi. Eftir hetta kunnu samráðingar takast upp við Føroya Kærustovn og avvarðandi stjórnarráð um at flyta Føroya kærustovni Kærumyndugleikan.

Til § 12

Brot á fylgjandi ásetingar verða revsa við sekt:
Tilætlað og óviljað brot á § 2, stk. 4 og 5. Um innflytarar og framleiðarar ikki gjalda pant og rakstrargjald fyri íløt fevnd av pantskipanini.
Tilætlað brot á § 5, stk. 1 og 2. Um sølustøð við móttøkuskyldu nokta at taka ímóti íløtum fevnd av pantskipanini og gjalda pant fyri tey.
Tilætlað og óviljað brot á § 7, stk. 2, 1. pkt. Um íløt verða seld ella avhendað áðrenn tey eru skrásett hjá pantumsitara.
Tilætlað brot á § 10. Um innflytari ella framleiðari ikki gevur eftilitsmyndugleikanum umbidnar upplýsingar
Tilætlað og óviljað brot á § 14, stk. 1. Um innflytarar og framleiðari ikki gjalda pant og rakstrargjald til TAKS.
Tilætlað brot á § 14, stk. 2. Um innflytarar og framleiðarar ikki geva TAKS umbidnar upplýsingar.

Orsøkin til, at revsingin fyri brot á § 14 stendur fyri seg sjálva í stk. 4 er, at § 14 og § 12, stk. 4 fara úr gildi 1. oktobur 2025 og eru sostatt bara galdandi í 4 mánaðir sambært § 13, stk. 2 og 4.

Til § 13

Í stk. 2 er ásett, at § 14 og § 12, stk. 4, eru í gildi frá 1. juni 2025 til 30. september 2025. Hetta er tí, at § 14 er ein skiftisáseting, sum verður yvirtikin av restini av løgtingslógini, tá hon kemur í gildi 1. oktobur 2025.

Til § 14

Ásetingin kemur sambært § 13, stk. 2 í gildi, saman við § 12, stk. 4, fýra mánaðir áðrenn hinar ásetingarnar í løgtingslógini. Talan er um eina skiftisskipan, sum fer úr gildi aftur 1. oktobur 2025 sambært § 13, stk. 2.

Orsøkin til ásetingina er tørvurin á at fáa øll íløt, framleiðarar, innflytarar og sølustøð skrásett í góðari tíð, áðrenn tann nýggja pantskipanin tekur við í fullum líki.

Innflytarar og framleiðarar skulu sambært stk. 1 og 2 gjalda pant og rakstrargjald gjøgnum TAKS samsvarandi løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Innflytarar og framleiðarar skulu somuleiðis skráseta vøruslag, slag og stødd á íløtum og strikukodu, tá vøran verður fráboðað TAKS við innflutning ella framleiðslu. Hesar upplýsingarnar verða samstundis skrásettar hjá IRF at nýta í fløskuautomatum, skannarum og øðrum maskinum, tá ið skipanin endaliga verður sett í verk.

Á hendan hátt fær skipanin so gott sum fullfíggjað yvirlit yvir íløtini, sum takast skal ímóti fýra mánaðir seinni, tann 1. oktobur 2025.

Fyri at skiftið frá tí gomlu til ta nýggju skipanina skal vera so smidligt sum gjørligt, og fyri at tryggja, at øll íløt á marknaðinum eru pantáløgd, tá ið tann nýggja skipanin verður sett í verk, er ætlanin at broyta galdandi lóg og kunngerð á heysti 2024 til at fevna um øll íløt, sum verða pantáløgd 1. oktobur 2025.

Orsøkin til, at peningsrenslið eisini verður umlagt, fýra mánaðir áðrenn restin av skipanini verður sett í verk, so at innflytarar og framleiðarar longu tá skulu gjalda IRF pant og rakstrargjald er, at tað lættir um skiftið frá tí gomlu til ta nýggju skipanina.

Frá 1. juni 2025 skulu framleiðarar og innflytarar gjalda gjøgnum TAKS við skipanini, sum verður gjørd til skráseting og uppkrevjing.

Í staðin fyri at framleiðarar og innflytarar rinda sølustøðum pantið, verður tað IRF, sum sambært stk. 4 fer at standa fyri at rinda pantið sambært uppgerð frá innflytarum og framleiðarum. Á henda hátt er peningurin, sum IRF tørvar til rakstur og pant fýra mánaðir seinni, tann 1. oktobur 2025, longu tøkur í pantskipanini. Eisini slepst undan trupulleikanum, at IRF í onkrum føri ikki veit, hvørjum rokningar fyri vantandi pant og rakstrargjald skulu sendast, við tað at fleiri innflytarar kunnu flyta inn somu vøru við somu strikukodu frá sama útlendska veitara.

Havast skal í huga, at IRF ikki heintar ella telur upp íløt hesar fyrstu fýra mánaðirnar. Hesar skyldur liggja enn á innflytarum og framleiðarum. Eitt sølustað, sum er ósamt við uppteljingina hjá einum innflytara ella framleiðara, má tí taka málið upp við viðkomandi innflytara ella framleiðara og ikki við IRF, sum bara hevur heimild at rinda sølustøðum pant sambært uppgerð frá innflytarum og framleiðarum.

Treytirnar til skjalprógv fyri afturbering sambært § 14, stk. 9, eru, at skjalprógvast kann, at íløtini eru farin til proviantering til toll- og avgjaldsfría nýtslu og sølu sambært kunngerð um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.

Umhvørvismálaráðið, 7. mars 2024

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Ummælisskjal viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um pantskipan fyri íløt
Fylgiskjal 2: Uppskot til kunngerð um pantskipan fyri íløt
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Matvørubúðini í Nólsoy
Fylgiskjal 5: Ummæli frá TAKS
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Rúsdrekkasølu Landsins
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Handilsvinnufelagnum
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Føroya Bjór
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Føroya Bjór
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Føroya Kærustovni